**Býráðsfundur mánadagin 24. februar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00296**<br>**Kæra frá Emil Olsen í Leirvík um bygging av leigiíbuðum í Leirvík**<br>Kærumálið frá Emil Olsen er heimsent til nýggja viðgerð. Kærunevndin metir, at málið kemur undir serloyvi sambært byggisamtyktini og at grannin burdi verið hoyrdur.<br><br>Avgerðin hjá Kærustovninum er umrødd við m.a. løgfrøðing. Kommunan hevur tikið avgerð sambært byggisamtyktini og heimildum tess. Málið verður her umrøtt til støðutakan, um kommunan skal viðgerða málið av nýggjum.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at kommunan heldur fast um, at byggiloyvið er av slíkum slag, at tað ikki krevst serloyvi samb. 4.11 í byggisamtykini. (Sí hjál. svarið til Kærustovnin í Lendismálum) | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskpanarnevndini. |
| 2. | **14/00018**<br>**Summarfrítíðin á dagstovnunum 2014**<br>Minnilutin í trivnaðrnevndini Oluffa Joensen mælir til at dagstovnarnir Brúsi, Gjái og Skúlaspírin*/Frítíðaheimið á Gásamýri verða stongd vegna summarfrí í viku 30 og 31. Møguleiki verður tó, hjá teimum sum hava tørv á "ansing" í viku 29 og/ella 32, at fáa barn teirra ansa, við sjálvi fara inn á heimasíðuna hjá kommununi og tilmelda seg.<br>Meirilutin Emma Rasmussen og Ólavur Olsen mæla til at dagstovnarnir Brúsi, Gjái og Skúlaspírin*/ Frítíðaheimið á Gásamýri verða stongd vegna summarfrí í viku 30 og 31. Møguleiki verður tó, hjá teimum sum hava tørv á "ansing" í viku 29 og/ella 32, at fáa barn teirra ansa, mótvegis einum gjaldi á kr. 400,00 um vikuna pr. barn.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir eisini til, at um so er, at | Hanna Jensen setti fram soljóðani broytingaruppskot:<br><br>*Ansing verður skipað alt árið og at leiðararnir á ansingarstovninum skipað starvsfólkatímarnir eftir tørvinum ymiskar tíðir á árinum. Møguleiki skal eisini vera fyri ansing í vikunum 29-32. Foreldur kunnu melda barnið til summaransing við bindandi tilmelding, einki gjald skal setast á summaransingina hon er partur av mánaðarliga gjaldinum gjøgnum árið.*<br><br>Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Hannu Jensen og atkvøtt bleiv soleiðis:<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Oluffa Joensen, Hanna Jensen |

**Býráðsfundur mánadagin 24. februar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

tilmeldaða talið av børnum til summaransingina í viku 29 og/ella 32, eru undir 10 børn pr. viku, verður einki tilboð sett í verk í tíðarskeiðinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í trivnaðarnevndini.

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christianen, Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Emma Rasmussen, Árni Jacobsen,

**Atkvøddi blankt:**
Hanus Jacobsen

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá minnilutanum í trivnaðarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Oluffa Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christianen, Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Emma Rasmussen, Árni Jacobsen, Hanus Jacobsen Hanna Jensen.

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá fíggjarnevndini og meirlutanum í trivnaðarnevndini og atkvøtt beliv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christianen, Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Emma Rasmussen, Árni Jacobsen, Hanus Jacobsen

**Atkvøddi ímóti:**
Oluffa Joensen, Hanna Jensen

Sostatt er tilmæli hjá fíggjarnevndini og meirlutanum í trivnaðarnevndini samtykt.

**3. 13/00544**
**Setan av gartnara**
Tilmæli frá umsitingini fyriliggur

Trivnaðarnevndin mælir til at gartnari verður settur í fast fulltíðastarv og at lýst verður sum skjótast. Mælt verður til at gartnarin heldur seg

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 24. februar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

til játtanina, sum er avsett á inniverandi fíggjarárið – 2014.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

4. **14/00087**

**Vinnufund/íverksetarafund**

Vinnunevndin hevur samtykt at skipa fyri vinnufundi og ella íverksetarafundi. Hesin skal verða í mars ella apríl. Eingin játtan er til hetta á fíggjarætlanini og tískil verður neyðugt við eykajáttan. Vinnunevndin mælir til at játtaðar verða 100.000,00.

Fíggjarnevndin mælir til at veit eykajáttan á 100.000,00 kr., og at peningurin verður tikin av innistandandi.

*Málið er partur av málið 14/00093 (Eykajáttanir 2014)*

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Atkvøður blankt:**
Oluffa Joensen

5. **14/00056**

**Umsókn um eykajáttan til uppstigan av KT-økinum í Leirvíkar skúla.**

Skúlastjórin hevur sent kommununi umbøn um at fáa eykajáttan til keyp av kt-útgerð. Biðið verður um eykajáttan á kr. 210.000,00 til 300.000,00 kr.

Mentanarnevndin mælir til at veit eykajáttan á kr. 210.000,00 umframt 130.000,00 sum vóru játtaðar í 2013, men ikki vóru brúktar

Mentanarnevndin hevur tað viðmerkjing, at hendan upphæddin átti at verði partur av innsendu fíggjarætlanini hjá skúlaleiðsluni fyri 2014.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av innistandandi.

*Málið er partur av málið 14/00093 (Eykajáttanir 2014)*

Oluffa Joensen setti fram broytingaruppskot at peningurin verður settur at á fíggjarætlanini fyri 2015.

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Oluffu Joensen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Oluffa Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

Síðani bleiv atkvøtt um uppskoti hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini og

**Býráðsfundur mánadagin 24. februar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

atkvøtt bleiv soleiðis

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Atkvøður blankt:**
Oluffa Joensen

Sostatt er tilmæli hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini samtykt.

**6. 14/00092**
**Eykajáttan til arbeiðið við at orða ein mentanarpolitik fyri Eysturkommunu.**
Mentanarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 80.000,00 til arbeiðið.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 80.000,00 kr., og at peningurin verður tikin av innistandandi.

*Málið er partur av málið 14/00093 (Eykajáttanir 2014)*

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen, við tí viðmerking at peningurin eigur at verða settur av á fíggjarætlanini fyri 2015.

**7. 14/00063**
**Nøgdsemiskanning innan barnaansingina í Eysturkommunu**
Frágreiðing og tilboð um kanningina fyriliggja.

Trivnaðarnevndin mælir til at býráðið tekur støðu til um eykajáttan skal gerast til kanningina.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 80.000,00 kr. til at gera kanningina fyri. Peningurin verður tikin av innistandandi

*Málið er partur av málið 14/00093 (Eykajáttanir 2014)*

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen við tí viðmerking at um ein kanning skal gerast, so eigur tað at verða avsett á fíggjarætlanini.

**Býráðsfundur mánadagin 24. februar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

**8. 14/00030**

**Tilmæli um skattafrælsi**

Taks hevur biðið um tilmæli í sambandi við at Áhugafelagið Tónleikamiðstøðin hevur søkt um skattafrælsi.

Fíggjarnevndin mælir til at viðmæla at skattafrælsi verður givið.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

*Oluffa Joensen var úti undir viðdgerðini vegna ógegni.*

**9. 14/00093**

**Eykajáttanir 2014**

Talan er um játtanir frá 2013 sum ikki vóru brúktar, og sum neyðugt verður at flyta til 2014, umframt aðrar eykajáttanir.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttanir sambært fyriliggjandi yvirlitið.

Íalt verða eykajáttaninar á 6.505.000,00 kr. 410.000,00 kr. til rakstur og 6.095.000,00 kr. til íløgur.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen við tí viðmerking, at hon tekur undir við teimum eykajáttanum sum verða fluttar frá 2013 til 2014, men er ímóti at geva nýggjar eykajáttnir.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

**Býráðsfundur mánadagin 24. februar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**
Emma Rasmussen ________________________________